

# drógu svart

araflotanum, og síðan royndust tey tvey árini undan 2009 – ávikavist 2008 og 2007 – eisini rímiliga góð.

– Soleiðis, sum veiðan hjá partrolarunum hevur verið higartil í ár, man árið kunna samanberast við okkurt av árunum fyri 2007, siga tey á Kongshavn.

Lagt verður aftrat, at helst koma aðrir partrolarar inn at landa miðskeiðiðs – ella í seinna parti av hesi vikuni.

*vilmund@sosialurin.fo*

# Hørð kapping um upsalastir

**FISKAPRÍSIR Í seinastuni hava partrolarar fingið rættiliga góðan prís fyri upsa, og Tummas Christophersen, reiðari í Vestmanna, sigur, at skipini hjá teimum hava fingið einar 8,50 krónur í miðal fyri kilo, sum má sigast at vera rættiliga góður prísur á upsa**

Vilmund Jacobsen

Nú útboðið á upsa hevur verið so lítið, sæst hetta eisini aftur á upsaprísinum. Fiskiskapurin er skiftandi, men hevur verið heldur svikaligur yvir eina longri tíð. Menn høvdu vónað, at veiðan fór at gerast betri, sum tað leið út á heystið, men framvegis er veiðan ógvuliga misjøvn. Summir túrar eru hampiligar góðir, og skip fáa uppí, tá tey raka á, meðan aðrir túrar miseydnast. Viðhvørt eru tað somu skip, sum gera góðar túrar, sum so túrin eftir gera ein bummtúr.

Tey virkir, sum serliga keypa og virka upsa, eru Faroe Seafood, Kósin og Delta Seafood, sum um Sandoy Seafood hevur sína upsaframleiðslu í Skopun.

TG Seafood í Hvalba virkar eisini nógvan upsa, men í Hvalba er ein lutfalsliga stórur fiskifloti, sum syrgir fyri meginpartinum av ráfiskinum, sum verður virkaður á virkinum har.

## Ikki ótryggleiki

Vestmannatrolararnir, Vestmenningur og Fram, hava fyri tað mesta lagt veiðina upp til Faroe Seafood í Vestmanna, men í seinastuni hevur reiðaríið selt veiðina hjá øðrum skipinum til Kósina í Klaksvík.

Higartil hava bæði skipini tó ikki landað í Klaksvík í senn.

Tummas Christophersen, reiðari í Vestmanna, sigur, at upsaprísurin hevur verið góður í seinastuni.

Hann vísir á, at skipini hjá teimum hava fingið í miðal einar 8,50 krónur fyri kilo, sum má sigast at vera góður upsaprísur.

Vit spurdu eisini reiðaran, um tað, at annað av skipunum hevur selt veiðina til Kósina í Klaksvík, hevur nakað við møguligan ótryggleika um avrokning frá Faroe Seafood at gera, men tað heldur hann ikki.

– Vit selja veiðina, har vit fáa mest fyri fiskin, og eg haldi ikki, at hetta hevur nakað við órógvið um Faroe Seafood at gera, sigur reiðarin í Vestmanna.

## Misjøvn veiða

Tummas Christophersen sigur tað sama, sum fiskimenn kring landið annars siga um upsaveiðina í løtuni.

– Veiðan er misjøvn. Summir túrar eydnast væl, og aðrir eydnast minni væl, leggur hann aftrat.

Í fleiri ár hevur upsaveiðan annars verið rímiliga góð, og líkt er til, at eitt nú partrolaraflotin ikki rættiliga hevur vant seg við, at upsaveiðan er vorðin meiri skiftandi.

*vilmund@sosialurin.fo*

> **... eg haldi ikki, at hetta hevur nakað við órógvið um Faroe Seafood at gera...**
>
> TUMMAS CHRISTOPHERSEN



*Í seinastuni hava vestmannatrolarar landað og selt nakrar upsalastir til Kósina í Klaksvík*

*Mynd: Karstin Vang*